Kendasti klovnurin í Danmark til Føroyar

Mánadagin komandi kemur kendasti klovnurin í Danmark, Pjerrot, til Føroyar. Pjerrot er kendur av Bakkanum, norðan fyri Keypmannahavn, og hevur Pjerrot verið har í útvið 200 ár.

Tað eru teir báðir føroysku klovnarnir, Fjotti & Bobo, ið hava bjóðað Pjerrot hendan vegin, og steðgar hann her í fýra dagar. Hesar dagarnar skal hann hava sýningar í Klaksvík, Glyvrum og Havn, umframt at hann eisini fer at undirvísa føroyskum undirháldarum.

Týsdagin verður hann á pallinum í SMS í Havn. Tvær sýningar verða seinnapartin. Týskvøldið verður hann í Róðrarnestinum hjá NSÍ á Glyvrum. Mikudagin verður hann í Norðoya Sparikassa og hósdagin hevur hann skeið fyri føroyskum undirhaldarum.

FJM í Runavík spennir seg út:

Keypt stóran virkisbygning á ídnaðarøkinum í Rituvík

- Vit hava ómetaliga nógv at gera í løtuni. Enniberg er nú um at vera liðugur, og síðan kemur rækjuskipið, Ocean Castle, sum eisini skal hava nýggja verksmiðju. Um mánaðarskiftið juni/juli fara vit til Spaniu at seta upp arbeiðsdekkið á nýggju trolarunum hjá P/F Beta, sigur Frithleif Olsen

VINNA
Vilmund Jacobsen

Enniberg, sum hevur ligið í Saltangará í hálvan annan mánað, er nú um at vera liðugur. At kalla øll verksmiðjan er gjørd av nýggjum

Maskinverkstaðurin, FJM við Fjørðuvegin í Runavík, hevur keypt nýggja bygningin, sum Símun Mittún hevur latið byggja á ídnaðarøkinum í Rytuvík. Yvirtøkudagurin er avtalaður at vera, 1. mars, og tá fer FJM í smáum at flyta sítt virksemi yvir í bygningin, sum er nógv størri enn tann verandi.Gamli bygningurin í Runavík er 510 fermetrar, meðan tann nýggi er 900 fermetrar og hevur møguleikar til skrivstovur í ovari hæddini, tí bygningurin er hægri enn tann gamli. Nakað av lofti er gjørt í nýgga bygninginum, men hann verður ikki yvirtikin við skrivstovum í loftinum. Tó kann hann takast í nýtslu beinanvegin, tí skrivstovur eru eisini í niðaru hæddini.

- Vit keypa bygningin lidnan, tó uttan skrivstovur í ovaru hæddini, sigur Frithleif Olsen, sum eigur og rekur FJM.

Hann vísir á, at ivasamt er, nær alt virksemið, sum nú er í Runavík, verður flutt í nýggju hølini, tí fyritøkan hevur so ómetaliga nógv at gera í løtuni. Men hetta verður gjørt so við og við.

- Í hálvan annan mánaða hava vit arbeitt umborð á Ennibergi, men hetta arbeiði er um at vera liðugt nú. Meginparturin av verksmiðjudekkinum er gjørt av nýggjum, og nýggj tól og maskinur eru sett upp. Annars hava vit tikið okkum av øðrum viðlíkahaldi umborð, sigur Frithleif og vísir á, at eitt av endamálunum við nýgerðini umborð á Ennibergi er at gera tað lættari at meirvirka fiskin, eitt nú til bitar.

Stór arbeiðir

Um stutta tíð fer FJM at gera eitt líknandi arbeiði umborð á rækjuskipinum, Ocean Castle, sum í løtuni er uttanlands og landar. Tá ið skipið kemur aftur, fer tað í dokk á Skála, og tá fer FJM so smátt undir at broyta verksmiðjuna umborð.

- Vit vænta, at meginparturin av hesum arbeiði fer fram, meðan skipið liggur í Saltangará, sigur Frithleif Olsen.

Men FJM hevur eisini onnur stór arbeiði fyri framman.

- Um mánaðarskiftið juni/juli skulu vit niður til Spaniu at seta upparbeiðsdekkini umborð á teimum báðum nýggju trolarunum, sum P/F Beta byggir har niðri. Hetta arbeiði verður gjørt til í Føroyum, og síðan fara fólk frá okkum niður at seta upp.

Spurdur, um fyritøkan hevur havt onnur slík arbeiðir uttanlands, sigur Frithleif, at teir hava ikki beinleiðis útflutt arbeiðsdekk ella verksmiðjur, men hava verið umborð á nógvum útlendskum skipum, sum hava verið í Føroyum.

35 fólk í arbeiði

Á FJM eru í løtuni 35 væl kvalifiserað fólk til arbeiðis, og tey hava sum nevnt ríkiligt at takast við.

Umframt hølini við Fjørðuvegin í Runavík, leigar fyritøkan eisini kjallaran hjá Bónus á Glyvrum.

- Vit fara møguliga at umhugsa at selja verandi bygning, tá ið virksemið í Runavík er flutt yvir í nýggja bygningin á ídnaðarøkinum í Rytuvík, sigur Frithleif.

Á FJM arbeiða teir mest við rustfríum stáli.

Hetta er ein privat fyritøka, ið veitir serkøna tænastu og framleiðslu av útgerð til fiskivinnuna.

FJ.M hevur Føroya størstu goymslu av rustfríum stáli, og kann soleiðis altíð veita viðskiftafólkum sínum eina góða og skjóta tænastu.

- Fyritøkan varð stovnað í 1986 og hevur verið í støðugum vøkstri. Við hollum royndum innan menning og framleiðslu av matvøruframleiðslutólum, er fyritøkan før fyri at veita heildarloysnir, líka frá tekniborði til liðug framleiðslutól, sigur Frithleif Olsen og vísir at enda á, at endamálið hjá FJM er at veita tænastur í tøttum og álítandi samstarvi við viðskiftafólk.

Í Vestmanna stríðast tey við smáan upsa

FISKIVINNA
Vilmund Jacobsen

Síðsta hósdag, fríggjadagin og mánadagin í hesi vikuni keypti Fiskavirking í Vestmanna stívliga 400.000 pund av upsa. Tað vóru trolararnir, Eysturbúgvin, Vesturbúgvin og Grønanes, sum landaðu hesa veiði.

Hetta er ikki smávegis ráfiskanøgd, og tá ið ein stórur partur hesum fiski er smáur upsi, er greitt, at tað tekur drúgva tíð, áðrenn alt er fingið ígjøgnum maskinurnar.

Og soleiðis var støðan í Vestmanna, tá ið Sosialurin frætti mikudagin.

– Nøgvur fiskur lá niðurfyri síðsta vikuskiftið, og mánadagin keyptu vit so eisini lastina hjá Grønanesi. So, her er ríkiligt at takast við, og vit noyðast at gera alt fyri at fáa fiskin undan fyri vikuskiftið komandi.

Í Vestmanna siga tey, at ein stórur partur av veiðini hjá summum skipum er upsi 4, og tað er rættiliga smáur fiskur, sum tekur drúgva tíð at arbeiða.

– Vit keypa ongan fisk aftrat hesa vikuna, men fara í staðin at leggja alla orku í at fáa ráfiskin, sum er inni, gjøgnum maskinurnar fyri vikuskiftið, sum nú stundar til. Vit hava ivaleyst av fiski inni sum er, siga tey í Vestmanna.

Í Vestmanna stríðast tey við at fáa fiskin undan fyri vikuskiftið, ið stundar til

Sosialurin spurdi, hvussu nógv seinni framleiðslan gongur, tá ið nógvur upsi 4 er uppi í veiðini. Vit spurdu, um framleiðslunøgdin kanska minkar eina helvt.

– Nei, so nógv minkar framleiðslan tó ikki, men hon fellir rættiliga nógv, tá ið fiskurin er so smáur, siga tey í Vestmanna.

Tøkk

Tøkk, tit øll, sum gleddu meg á 70 ára degnum.

Heilsan
Johild Joensen
Froðba

Tingið er fyri fráskúlum

Mentamálastýrið er farið undir at fyrireika lógaruppskot um fríkúlar, og gongst sum landsstýrismaðurin við mentamálum ætlar, verður uppskot lagt fyri tingið í hesu setuni

FRÍSKÚLI
Turið Kjølbro

Landsstýrismaðurin við mentamálum, Óli Holm, hevur nú loddað dýpið millum tingfólk, hvørt tey eru fyri fráskúla ella ikki. Aðalorðaskiftið vísir greitt, at tingfólk eru fyri, og tí verður lógaruppskot um fríkúlar nú fyrireikað

Eftir aðalorðaskiftinum í tinginum um fríkúlar týsdagin at døma, er hugburðurin hjá tingfólki um fríkúlar positivur. Framsøgufólkini fyri allar flokkar vóru fyri fríkúlum, men Javnaðarflokkurin hevði ávís fyrivarni. Kjakið í tingsalinum var spakt, men sjálvur heldur landsstýrismaðurin, at tað var bæði gevandi og áhugavert.

– Eg fekk eina greiða ábending um, at tingfólk eru sinnað fyri at royna hesa alternativu leið. Hugburðurin er positivur og vit kunnu staðfesta, at mørk eru flutt, sigur Óli Holm, landsstýrismaður.

Umsitingin í Mentamálastýrinum er longu farin undir at fyrireika eina lóg um fríkúlar, og gongst sum landsstýrismaðurin ætlar, verður ein slík løgd fyri tingið longu í hesi setuni. Arbeiðast skal skjótt, tí freistin at leggja tingmál fyri tingið í hesu setuni er longu úti um ein mánað. Álitið, sum ein arbeiðsbólkur hevur gjørt, skal liggja til grund fyri lógaruppskotinum.

– Álitið er tvey ára gamalt, og tí eru dagføringar og broytingar neyðugar, sigur Óli Holm.

Bæði og

Landsstýrismaðurin heldur ikki, at tað er rætt at seta fólkaskúlan upp ímóti fríkúlum, sum fólk hava havt lyndi til.

– Spurningurin er ikki um annað hvørt fólkaskúla ella fríkúla, men bæði og. Eg óttist ikki fyri, at fólkaskúlin fer at lúta í einum stríði ímillum skúlarnar. Heldur hinvegin, eri eg sannførdur um, at fríkúlar fara at geva fólkaskúlanum eina sunna avbjóðing. At fríkúlar fáa ein møguleika, merkir ikki tað sama sum, at fólkaskúlin skal raðfestast lægri. Kjakið um fólkaskúlan eigur at snúgva seg um rættin til alternativ undirvísingartilboð og aðrar undirvísingarhugsjónir, sum hava til endamáls at tryggja øllum somu undirvísingartilboð og møguleikar uttan mun til fíggjarligu-, sosialu-, etnisku- ella trúarstøðu. Fólkaskúlin er stirvin og vit vita, at tað eru næmingar, ið høvdu verið betur fyri við einum alternativum tilboði sum einum fríkúla.

Foreldragjaldið til fríkúlar varð nógv umrøtt undir orðaskiftinum.

– Tað er rímuligt, at foreldrini gjalda ein part. Sjálvsagt skal gjaldið ikki vera so høgt, at tað verður ein fíggjarlig forðing fyri summi, tí tá eru grundhugsjónirnar settar til viks.

Fyrivarni

Framsøgufólkið fyri Javnaðarflokkin, Katrin Dahl Jacobsen, segði í síni røðu, at tað er rætt, at møguleiki verður fyri at seta á stovn fríkúlar, men tað skal ikki vera ímóti fólkaskúlanum.

– Motivini fyri, hví fríkúlar skulu setast á stovn, eru ómetaliga umráðandi. Mín vón er, at ætlanin at seta á stovn fríkúlar verður framd við tí fyri eyga at menna okkara skúlaskap sum heild. Tað er væl hugsandi, at fleiri skúlatilboð fara at hava góða ávirkan á bæði fólkaskúla og fríkúla, men tað er ilt at meta um áðrenn, tí tað veldst um, hvat slag av fríkúlum vit fáa, hvussu nógvar og hvar í landinum teir koma, segði Katrin Dahl Jacobsen, tingkvinna, undir orðaskiftinum.

Niðurfeld ætlan

Í samgonguskjalinum stendur, at møguleiki skal vera fyri frí- og eftirskúlum. Tískil setti fyrsti landsstýrismaðurin við mentamálum í hesum valskeiðinum eina nevnd at gera uppskot um fríkúlalóg. Arbeiðsetningurin var at lýsa málið um fríkúlar við atliti at bústaðarmynstrinum, lýsa tørv á hesum í okkara samfelag, og at skriva álit um málið. Somuleiðis skuldi arbeiðsbólkurin geva landsstýrismanninum eitt ummæli av málinum, gera eitt lógaruppskot um fríkúlar at leggja fyri løgtingið, og lýsa væntandi fíggjarligar avleiðingar, um eitt lógaruppskot um fríkúlar verður samtykt.

Ein røð av millumtjóða sáttmálum ásetur rættin hjá foreldrum at skipa sínar egnu skúlar. Rætturin til at skipa og reka fríkúlar er ein almennur rættur, ið er ásettur í ST-sáttmálunum um fíggjarlig, sosial og mentanarlig rættindi, og í barnakonventiónini hjá ST.

Landsstýrismaðurin við mentamálum torir ikki at spáa um, nær fyrsti fríkúlin sær dagsins ljós og hvussu nógvir koma.

– Eg kann ikki ímynda mær, at vit fáa eitt stórt tal av fríkúlum. Ongar kanningar eru gjørdar av, hvussu stórur tørvurin er á fríkúlum. Ei heldur havi eg nakran varhuga av, at áhugin at seta á stovn fríkúlar er øgiliga stórur millum skúlafólk.

– Mín vón er, at ætlanin at seta á stovn fríkúlar verður framd við tí fyri eyga at menna okkara skúlaskap sum heild, sigur Katrin Dahl Jacobsen, tingkvinna

Stórur tørvur á pedagogum

– Í farnu viku fingu 23 pedagogar prógv, men hetta er bert ein dropi í havinum, um vit tosa um at nøkta tørvin, sigur Carita Björklund, forkvinna í Føroya Pedagogfelag

PEDAGOGAR
Turið Kjølbro

Forkvinnan í Føroya Pedagogfelag, Carita Björklund, søknast eftir at vita, um ætlanin er at taka fleiri pedagogflokkar inn á Pedagogskúlan

Síðani kommunurnar yvirtóku dagstovnaøkið, er rættiliga ferð komin á bygging av dagstovnum í Føroyum. Fleiri hundrað stovnspláss eru útvegað um alt landið stutta tíðarskeiðið síðani, um somu tíð sum fleiri serstovnar eru komnir, men tað sum verri er, er at pedagogar ikki fylgja við. Tørvurin á útbúnum pedagogum er ógvuliga stórur og veksur alsamt. Hvussu stórur tørvurin er, er ilt at meta um, men ein ábending er límataløð hjá Føroya Pedagogfelag. Umleið 1000 limir eru í felagnum, harav gott og væl helmingurin eru hjálparfólk. Í farnu viku fingu 23 pedagogar prógv, men hetta er bert ein dropi í havinum, um vit tosa um at nøkta tørvin.

– Í serstovnalógini eru øll størvini normerað til pedagogar, meðan dagstovnalógin ásetur, at í minsta lagi tveir triðingar á stovninum skulu vera pedagogar. Veruleikin er ein heilt annar. Á nógvum dagstovnum er bert leiðarin pedagogur, serstovnarnir eru eitt sindur betur fyri í so máta. Um alt landið eru stovnarnir eins fyri, vit síggja, at eisini í Havn er trupult at útvega pedagogar. Seinastu tvey árini hava vit tíbetur sæð, at fleiri útbúnir pedagogar søkja størv á dagstovnunum, sigur Carita Björklund, forkvinna í Føroya Pedagogfelag.

Bert ein pedagogflokkur verður tikin inn á Pedagogskúlan um árið. Á hvørjum ári liggur talið á umsóknum um hálvt annað hundrað. Í viðtali í blaðnum í farnu viku, sigur rektarin á Føroya Læraraskúla, at Læraraskúlin hevur leingi gjørt vart við, at stórur tørvur er á pedagogum, og at tørvurin er alsamt vaksandi, men tað tykist at vera trupult at fáa ljóð fyri hesum. Hann heldur, at eitthvørt átti at verið gjørt í bræði.

– Vit vístu leið, tá ið vit fyri næstan tíggju árum síðani høvdu eina roynd við samlestri millum lærarar og pedagogar fyrsta árið. Hetta er leiðin, sum gingin verður nú í londunum uttan um okkum, segði Pauli Nielsen.

Forkvinnan í Føroya Pedagogfelag søknast eftir at vita, um ætlanin er at taka fleiri pedagogflokkar inn fyri at nøkta tørvin á pedagogum. Hon heldur eisini, at tíðin er komin at kjakast nærri um útbúgvingina.

– Spurningurin er, um vit skulu seta á stovn eina útbúgving fyri seg, um útbúgvingin skal halda fram í verandi líki, ella um felagsgrundár verður gjørt fyri bæði pedagog- og lærarálesandi, sum vit síggja nógva staðni. Felagsgrundstøðið er ein góður møguleiki fyri at leggja grund undir einum góðum samstarvi millum fakbólkarnar frameftir til frama fyri barnið. Vit kundu eisini hugsað okkum at frætt nærri, hvør politiski viljin er á økinum.